# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Anna Kristina Dam Schultz**, ættað úr Vestmanna, búsitandi í Albertslund, andaðist mikudagin 22. oktober, 73 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Glostrup kirke leygardagin 1. november klokkan 12.30.

**Linda Sandø Wils Poulsen**, kona Petur Olaf Poulsen, vanliga nevndur Pidde, fer til gravar úr Gilleleje kirkju hósdagin 30. oktober klokkan 15.

**Dagurin**

**29. oktober. Narcissus**, deyður ár 222. Hevur helst verið av grikskari ætt og gjørdist 30. biskupurin í Jerusalem. Hann segðist at vera 116 ár, tá hann doyði.

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!

# Realskúlamynd frá 1927



Mynd frá ”Realskúlaframsýningini 1916-66”, sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er tikin av nøkrum næmingum í skúlagarðinum í 1927.

**Aftara rað:** Sigmund Hoydal, Eigil Christiansen (seinni Leyni), Leynar, og Mikkjal Helmsdal.

**Fremra rað:** Mourits Rubeksen (fremst), Th. Pauli Christiansen (Palli), Jákup Olsen (Aggeba, hjá Olaf í Fútastovu), Eilif Joensen (hjá Jakki við Stein), ókendur, og Havgrímur Johannesen.

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánjalsdóttir á telefon: 226024. (mynd nr. 271).

# Konsert við Carolu í Norðurlandahúsinum

**TÓNLEIKUR**
*Tíðindaskriv*

Leygarkvøldið 29. november 2008 bjóðar Five Star Entertainment til jólakonsert við heimskendu svensku Carola. Konsertin verður í Havn, í ítróttarhøllini í Hoyvík.

Carola fer í november og desember á jóla-konsertferð í Norðurlondum og er tað í hesum sambandi, at hon eisini leggur leiðina til Føroyar, og verður konsertin í Føroyum tann fyrsta á konsertferðini. Sangirnir hon fer at framføra spenna heilt frá hennara egna lagi »Himlen i min famn« og til vælkendar jólaslagarar sum »Nu tändas tusen juleljus« og »Drummer Boy«.

Sum tann lívsglaða og spontana sangarinnan hon er, kunnu vit rokna við, at hon eisini bjóðar føroysku børnunum upp á pallin at taka lut í framførsluni.

Kapellmeistari verður Pelle Ankarberg, ið eisini fer at sita við flyglið. Við sær á ferðini hevur hon eisini gospelkórið By Grace. Umframt Føroyar hevur Carola konsertir í Svøríki, Noreg, Finnlandi og Danmark.

Konsertin verður í ítróttarhøllini í Hoyvík leygarkvøldið 29. november 2008 kl. 20.00.

Konsertin er stuðlað av Eik og Atlantic Airways.

Atgongumerkini kosta 375,- kr. og verða frá fríggjadegnum 31. oktober 2008 seld á internetinum, umvegis heimasíðu okkara www.fivestar.fo. Meiri verður at frætta um hetta seinni.




*Bogi Andreasen frá Five Star Entertainment, ið skipar fyri konsert við svensku Carolu*